Krosstein

Pf. Svend

HAFA NEW VISION

Baðirúmsmøblar

VHS
Alt tilfar til
VATN
HITAVERK
SANITET
VENTILATIÓN

LYSING NR. 7

Falkavegur 6 - FO 110 Tórshavn
Tlf. 314600 - Fax 317360
Teldupostur: sk@post.olivant.fo


## Landssjúkrahúsið

**FO-100 Tórshavn**

## Sjúkrasystir
## (avloysari)

Á barnadeildini B4 verður eitt starv leyst at søkja á starvsbrøki 0,7 í blandaðum vaktum at byrja skjótast gjørligt og til 1. mai 2000.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Tove Thomsen deildarsjúkrasystir tlf. 313540 lokal 114.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2,**
**FR-100 Tórshavn**

**Umsóknarfreistin:** 20. desember 1999 kl. 14.00.


**HANS BECH**
*húsasmiður*
**ALT INNAN HÚSASMÍÐ**
Kongsgil 25 • 100 Tórshavn
far 21 25 61


## SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI

*The Course Centre at Langasandur*

# NÝGGJAR SKEIÐSRØÐIR nøkur pláss eftir!

**Vikuskiftisskeið;** byrja fríggjakvøld kl. 19, enda sunnudag kl. 16:

*Føroyskt fyri øll,* Álvur Enni.
28.-30. januar, 18.-20. februar, 7.-9. apríl og 28.-30. apríl. Kostnaður: 7.000 kr.

*Enskt í altjóða ferðavinnu* (English for International Tourism), Sue Philbrow, Alex Ocampo og Tórður Jóansson.
7.-9. januar, 11.-13. februar, 3.-5. mars og 14.-16. apríl. Kostnaður: 7.000 kr.

*Brodering og maskinbrodering,* Malan Rubeksen.
4.-6. februar og 31. mars-2. apríl. Kostnaður: 1.950 kr. hvørt vikuskiftið.

*Binding,* Elspa Sumberg.
25.-27. februar og 5.-7. mai. Kostnaður: 1.950 kr. hvørt vikuskiftið.

Tilmelding sum skjótast. Skeiðini eru øll vistarskeið, og alt er íroknað, t.e. gisting og máltíðir, frálæra og tilfar.

Avmarkað luttakaratal: 8-12.

Avsláttur til stovnar og bólkar.

Reikað verður fyri umbidnum skeiðum.

**SKEIÐSDEPILIN**
**438 Langasandur**
Tlf. 422521, 423530, 422073
ella fax 422521
Fartlf. 283530 ella 212076

---------- kutið her ----------

Gerið so væl at senda mær tilfar um skeiðini, sum byrja í januar:

Navn:_____
Bústaður:_____
Bygd/býur:_____
Tlf._____

Almanna- og Heilsumálastýrið

# EDV-leiðari

Eitt starv sum EDV-leiðari undir Almanna- og heilsumálastýrinum við Almannastovuni sum serligt ábyrgdarøki verður við hesum lýst leyst til setan 1. januar 2000 ella eftir nærri avtalu.

**Ábyrgd og uppgávur:**
- systemábyrgd av edv-skipanini á Almannastovuni
- liðugtgerð av edv-projekti
- ábyrgd av dagliga edv-rakstrinum
- stýring av edv-samskiftinum við aðrar stovnar
- tænastuveiting til fakdeildirnar á Almannastovuni
- undirvísing í edv-skipanum
- ábyrgd av góðum samstarvi millum Almanna- og heilsumálastýrið og Almannastovuna á edv-økinum.

**Førleikakrøv:**
Vit ímynda okkum ein persón sum:
- hevur drúgvar royndir í fyrisitingarligum skipanum
- hevur fyrisitingarligt hegni
- hevur hægri útbúgving á einum støði sum krevst, til tess at hava ta ábyrgd og loysa tær uppgávur, sum nevndar eru
- hevur góð samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Almanna-og heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils ábyrgdarøki Almannastovan. Møguleiki er fyri at starvsøkið kann verða broytt um broytingar í bygnaði ella líknandi verða framdar, sum krevja tað.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Almannastovuna, Petur Rouch, tlf. 31 54 80 ella Almanna- og heilsumálastýrið, Maria á Dul, tlf. 35 40 44.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:
Almanna- og heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 20.desember 1999 kl. 14.00

www.sosialurin.fo